# LØGTINGIÐ

## TINGHÚSVEGUR 1 - 3

## GRANNSKOÐANARFRÁGREIÐING

## 2009

**FRUMRIT**

**Inngangur**
Vit hava grannskoðað tær kontur, sum eru á §1 í Landsroknskapinum fyri 2009 - roknskap løgtingsins, umsiting tess og stovnar, knýttir at løgtinginum.

*Frágreiðing okkara hevur verið send leiðsluni á umsiting løgtingsins, Súsonnu Danielsen, leiðsluni á Landsgrannskoðanini, Beintu Dam og Løgtingsins umboðsmanni, Sólju í Ólavsstovu, til ummælis. Teirra viðmerkingar eru tilskilaðar í frágreiðingini.*

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**
Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin fyri 2009. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í roknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í roknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í roknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at leiðslan kann gera ein roknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu roknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at roknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av úrslitinum av virksemi Løgtingsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2009.

## Grannskoðanin

**Alment**
Vit hava við stakroyndum eftirkannað sannanina viðvíkjandi upphæddum og upplýsingum í rakstrarroknskapinum. Vit hava gjøgnumgingið og mett um mannagongdir og innaneftirlit, ið hava týdning fyri hvussu rakstrarroknskapurin er uppsettur. Harumframt hava vit við stakroyndum kannað skjalatilfarið og tilhoyrandi bókingar. Vit hava við stakroyndum kannað kostnaðarskjøl, til tess at staðfesta, um rætti persónur hevur ávíst og váttað skjølini, um rætt er bókað og at skjølini annars hoyra stovninum til. Gjøgnumgongd okkara hevur ikki ført til nakrar viðmerkingar.

Undir grannskoðanini verða upphæddirnar í rakstrarroknskapinum kannaðar, samanhildnar við undanfarin ár og við givnum játtanum.

Vit hava somuleiðis gjøgnumgingið fundarfrágreiðingar hjá formanskapinum fram til 11. november 2010. Vit hava ongar viðmerkingar í hesum sambandi.

**Játtan**
Tann samlaða jattanin til løgtingið er uppá 43,8 mió.kr. og er sundurgreinað soleiðis niður á øki (mió.kr.):

| Stovnur: | 2009 | 2008 | Øking í % |
|---|---|---|---|
| Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn | 4,5 | 5,9 | -23,7 |
| Løgtingsarbeiði | 29,8 | 29,4 | 1,4 |
| Nýggjur bygningur | 0,3 | 1,0 | -70,0 |
| Landsgrannskoðanin | 6,0 | 6,1 | -1,6 |
| Løgtingsins umboðsmaður | 3,2 | 3,3 | -3,0 |
| **Tilsamans** | **43,8** | **45,7** | **-4,2** |

Játtanin til løgtingsarbeiði er sundurgreinað soleiðis (mió.kr.):

| Stovnur: | 2009 | 2008 | Øking í % |
|---|---|---|---|
| Løgtingsmenn | 18,6 | 18,8 | -1,1 |
| Fyrisiting løgtingsins | 9,3 | 8,6 | 8,1 |
| Stuðul til parlamentariskt arbeiði | 1,7 | 1,6 | 6,2 |
| Eftirlitisuppgávur | 0,2 | 0,4 | 0 |
| **Tilsamans** | **29,8** | **29,4** | **1,4** |

Sum tað framgongur omanfyri, so er tann størsta einstaka lækkingin í játtanini til nýggja bygningin – ein lækking í játtanini uppá 70%. Játtanin er farin úr 1 mió.kr. niður á 250 t.kr. samanborið við 2008. Eisini er játtanin til eftirløn og bíðiløn, landsgrannskoðanina og løgtingsins umboðsmann lækkað við ávíkavist 23,7%, 1,6% og 3,0%, løgtingsarbeiðið er økt við 1,4% samanborið við 2008.

Tann samlaða lækkingin er uppá 4,2% samanborið við 2008 – hetta er ein lækking uppá 1,9 mió.kr.

## Lønir v.m.

Lønir v.m. eru nógv tann størsti kostnaðarposturin hjá løgtinginum við tilhoyrandi stovnum. Tískil hevur grannskoðanin lagt serligan dent á at kanna lønarútgjaldingarnar v.m. fyri 2009. Kanningar okkara hava tikið støði í galdandi lóggávu, sáttmálum o.s.fr.

*Tingmenn*
Viðv. tingmonnum hava vit undir grannskoðanini kannað um samsýningar, kostnaðarendurgjøld og ferða- og dagpeningur uttanlands til løgtingsmenn er goldið í tráð við løgtingslóg nr. 12. frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna. Eftirlønir og bíðilønir eru somuleiðis kannaðar. Samanhildið er við galdandi sáttmálar.

Tingmenn verða samsýntir samsvarandi 34. lønarflokki í tænastumannalógini, íroknað vanliga viðbót. Afturat hesum verður veitt árligt kostnaðarendurgjald, svarandi til flutningskostnað 100 ferðir aftur og fram árliga, koyripeningur millum heimstað og Tórshavn 100 ferðir aftur og fram árliga, tímapening fyri 10 tímar dagliga í 100 dagar, tó fyri Suðuroyar tingmenn fullur dagpeningur í 100 dagar. Tingmenn í Tórshavn, Hoyvík, á Argjum og Hvítanesi fáa ikki kostnaðarendurgjald. Harumframt verður veitt kostnaðarískoyti uppá kr. 2.000 um mánaðin.

Næstformonnum Tingsins og nevndarformonnum verður veitt ein samsýning, ið er kr. 30.000 árliga, tó so um tingmaður røkir meira enn eina av hesum uppgávum, so verður bert ein samsýning veitt.

Kostnaðarendurgjaldið verður lækkað við 1/100 av kostnaðarendurgjaldinum, fyri hvønn tingdag, tingmaður ikki møtir á løgtingsfundi. Løgtingsskrivstovan ger frádráttin upp á hvørjum ári í juni mánað. Vit hava staðfest, at tær reguleringar, ið eru framdar samsvara við undirliggjandi skjøl viðvíkjandi fráveru.

Grannskoðan okkara hevur eisini umfatað ferðaforskot og ferðauppgerðir hjá tingmonnum. Veitt verður ferðaendurgjald og dag- og tímapeningur eftir reglunum, sum eru galdandi fyri tænastumenn landsins. Reglurnar eru ásettar í rundskrivi frá fíggjarmálaráðnum dagfest 1. januar 2009 um tænastuferðir uttanlands v.m. Upphæddirnar eru ásettar í vegleiðing til ferðauppgerð fyri tænastuferðir uttanlands.

Ongar viðmerkingar eru annars í hesum sambandi.

**Løgtingsskrivstovan, Landsgrannskoðanin og Løgtingsins umboðsmaður**
Vit hava eisini fyri Løgtingsskrivstovuna, Landsgrannskoðanina og Løgtingsins umboðsmann kannað, um útgoldnar lønir v.m. eru samsvarandi galdandi lønarsáttmálum við avvarðandi feløg, eins og skjalprógv fyri umflokkingum, setanarskrivum v.m. eru kannað.

Fleiri viðmerkingar eru ikki í hesum sambandi.

**Stuðul til parlamentariska arbeiðið**
Stuðulin verður goldin, sambært Floksskrivarareglugerð frá 25. januar 2000, við tilhoyrandi broytingum 1. mars 2000 og 13. mars og 19. november 2008. Hvør flokkur fær grundgjald uppá 65 t.kr. Harumframt hevur hvør flokkur rætt til 35 t.kr. árliga fyri hvønn tingmann meira enn ein.

Sambært §7 í reglugerðini skal grannskoðari løgtingsins eisini grannskoða henda roknskapin.

Løgtingsskrivstovan umsitur stuðulin, men hvør flokkur skal tilnevna ábyrgdarpersón, sum hevur ábyrgdina av, at stuðulin verður umsitin, sambært reglunum.

Vit hava skjalagrannskoðað kostnaðirnar viðv. stuðli til parlamentariska arbeiðið. Løgtingsskrivstovan hevur góðkent og ávíst skjølini, sum ábyrgdarpersónur fyri viðkomandi tingbólk, hevur váttað.

Sambært reglugerðini, skal í minsta lagi helvtin av stuðlinum nýtast til skrivara/r, t.v.s umframt løn, eisini frítíðarløn, arbeiðsmarknaðargjøld v.m.

Niðanfyri standandi talva lýsir, í hvønn mun síðstnevnda treyt er lokin:

| T.kr./flokkur | A | B | C | D | E | H | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Umboð á tingi | 7 | 7 | 6 | 2 | 8 | 3 | 33 |
| Grundupphædd §1 | 86 | 86 | 86 | 86 | 86 | 86 | 517 |
| Tingmannaupphædd §2 | 268 | 268 | 224 | 45 | 313 | 89 | 1.207 |
| Stuðul tilsamans | 354 | 354 | 310 | 131 | 399 | 176 | 1.724 |
| Nýtsla 2009 | 355 | 355 | 310 | 109 | 389 | 123 | 1.641 |
| Meir/Minninýtsla | 1 | 1 | 0 | -22 | -10 | -52 | -83 |
| Lønir | 310 | 436 | 288 | 83 | 326 | 101 | 1.544 |
| Helvtin av stuðli til lønir | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |
| - munur | 133 | 259 | 133 | 18 | 126 | 13 | 682 |
| Helvtin av kostn. til lønir | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |
| - munur | 133 | 258 | 133 | 29 | 132 | 40 | 724 |
| Max. helvtin av stuðli til annað enn lønir | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |

Sum tað framgongur av talvuni omanfyri, so er talan um eina minninýtslu samanlagt uppá 83 t.kr. Tó hava fólkaflokkurin og sambandsflokkurin nýtt 1 t.kr. meira enn játtað. Flokkarnir eru gjørdir varugir við hetta av løgtingsskrivstovuni. Grannskoðanin fer í hesum sambandi at vísa á, at sanktiónsmøguleikar ikki eru til staðar fyri flokkar, sum ikki halda latnu játtanina, ella fyri flokkar, sum nýta játtanina til onnur endamál, enn tað, sum ætlanin er. Heitt verður á formansskapin um at umhugsa sanktiónsmøguleikar hesum viðvíkjandi.

Í reglugerðini um stuðul til flokkarnar á tingi og um løn til floksskrivarar §5, stk. 3 er ásett, at um tingbólkurin í einum fíggjarári hevur brúkt meira enn tillutaða stuðulin, verður meirnýtslan drigin frá í stuðlinum fyri næsta ár.

Víst verður á, at fólkaflokkurin, sambandsflokkurin, javnaðarflokkurin og tjóðveldið, hava nýtt meira til lønir, enn hvat játtanin til økið er samanlagt.

Spurningurin um ásetingin, at minst helvtin av stuðlinum skal verða nýttur til lønir, er nóg greitt orðað. Men sambært Løgtingsskrivstovuni hevur formansskapurin tulkað ásetingina soleiðis, at í mesta lagi helvtin av stuðlinum kann brúkast til annað enn til lønir. Fyri 2009 lúka allir flokkar hesa áseting.

Vit endurgeva § 4 í reglugerðini um "stuðul til parlametariskt arbeiði" frá 19. november 2008 niðanfyri:

> *"§4 Í minsta lagi helvtin av stuðlinum eftir § 1 skal nýtast til skrivara/r."*

Samsvarandi §6 stk. f. í reglugerðini um stuðul til flokkarnar á tingi og um løn til floksskrivarar skulu flokkarnir føra eitt ognaryvirlit yvir ognirnar hjá flokkinum.

**Setanarskriv hjá Tinglimum**

Lóggávan ásetur, at løgtingsmaður, sum er í almennum starvi í mesta lagi kann starvast 50% av tíðini í hesum starvi, meðan hann er løgtingsmaður ella varamaður fyri løgtingsmann. Vit hava kannað, um skjalprógv fyriliggur frá arbeiðsgevarum, ið koma undir hesa reglu, sum kom í gildi pr. 1. august 1999.

Spurningurin er, um reglurnar sum heild eru nøktandi. Lógarkravið viðv. starvsumráði v.m. er greitt, men tað vanta greiðir sanktiónsmøguleikar, tá tingmaður ikki lýkur treytirnar.

**Roknskapargóðkenning**

Í frágreiðing okkara undanfarin ár er heitt á formansskapin um, í sambandi við roknskapir, at innføra váttanarmannagongd fyri Landsgrannskoðanina, Løgtingsskrivstovuna og Løgtingsins Umboðsmann. Arbeitt

hevur verið við málinum, tó uttan at avgreiða hetta. Heitt verður á formansskapin um at taka støðu til, um váttanarmannagongd skal setast í verk.

**Grannskoðanarfrágreiðing 2008**
Vit hava kannað og staðfest, at formansskapurin hevur viðgjørt og góðtikið grannskoðanarfrágreiðingina fyri 2008.

## Upplýsingar viðv. roknskapinum

Roknskapur løgtingsins við tilhoyrandi stovnum er settur upp í Landskassaroknskapinum fyri 2009.

Niðanfyri eru høvuðskontur á §1 settar upp. Yvirlitið vísir nýtslu og játtan fyri 2009. Upphæddirnar fyri 2008 eru somuleiðis vístar (t.kr.).

| | SKJAL | t.kr. 2009 | t.kr. Játtan | t.kr. 2008 |
|---|---|---|---|---|
| **Løgtingið** | | | | |
| Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn | D | 4.546 | 4.544 | 5.369 |
| Løgtingsarbeiði | | | | |
| Løgtingsmenn | | 18.159 | 18.636 | 18.074 |
| Stuðul til parlamentariska arbeiðið | | 1.641 | 1.724 | 1.528 |
| Eftirlitsuppgávur | | 0 | 150 | 0 |
| Fyrisiting løgtingsins | | 8.935 | 9.331 | 8.384 |
| Løgtingsarbeiðið tilsamans | A | **28.736** | **29.841** | **27.986** |
| Nýggjur bygningur til Føroya Løgting | E | 258 | 250 | 885 |
| | | **33.540** | **34.635** | **34.240** |
| **Stovnar, knýttir at løgtinginum** | | | | |
| Landsgrannskoðanin | B | 5.147 | 5.978 | 4.965 |
| Løgtingsins umboðsmaður | C | 3.122 | 3.180 | 2.960 |
| | | **8.269** | **9.158** | **7.925** |
| **Kostnaður, løgtingið tilsamans** | | **41.809** | **43.793** | **42.165** |
| Játtan tilsamans | | 43.793 | | 45.674 |
| **Minninýtsla í mun til játtan** | | **1.984** | | **3.509** |

Niðanfyri hava vit gjørt viðmerkingar til útvaldar høvðuskontur í mun til játtanir og í mun til 2008. Viðmerkjast skal, at sambært játtanarskipanina, skulu játtanir haldast á høvuðskontustigi, og somuleiðis skulu lønarjáttanir haldast. Frávik kunnu verða á standardkontum - undirkontur til høvuðskontur - í mun til tær ætlanir, stovnurin upprunaliga hevði.

**Samlaði raksturin**
Samanumtikið vísir roknskapurin fyri 2009, at talan er um eina minninýtslu í mun til játtan á øllum høvuðskontum. Kostnaðurin er samanlagdur 41,8 mió.kr., meðan játtanin er uppá 43,8 mió.kr. Kostnaðirnir

eru lækkaðir samanlagt við 356 t.kr., í mun til 2008.

**Løgtingsmenn**
Niðanfyri er høvuðskontan løgtingsmenn nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar, í mun til 2008 og í mun til ætlanina fyri 2009 (t.kr.):

| | 2009 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2008 | Munur 2008-09 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 14.793 | 15.241 | -448 | 14.754 | 38 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.001 | 1.045 | -44 | 935 | 66 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 0 | 0 | 0 | 50 | -50 |
| Ymiskur rakstrarkostnaður | 2.120 | 2.100 | 20 | 2.085 | 35 |
| Tilskot til útlandið | 246 | 250 | -4 | 250 | -4 |
| | **18.159** | **18.636** | **-477** | **18.074** | **85** |

Verður samanborið við játtanina er talan um eina lækking í lønum uppá 448 t.kr. Samanborið við 2008 eru lønirnar hækkaðar 38 t.kr.. Í sambandi við keyp av vørum og tænastum er talan um eina minninýtslu uppá 44 t.kr., samanborið við játtanina. Samanlagt er nýtslan 477 t.kr. minni enn játtanin. Samanborið við 2008 er talan um eina hækking í samlaða kostnaðinum uppá 85 t.kr.

**Stuðul til parlamentariska arbeiðið**

| | 2009 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2008 | Munur 2008-09 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 1.544 | 1.524 | 20 | 1.350 | 195 |
| Keyp av vørum og tænastum | 63 | 200 | -137 | 91 | -28 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 34 | 0 | 34 | 88 | -54 |
| | **1.641** | **1.724** | **-83** | **1.528** | **113** |

Sum víst omanfyri eru útgoldnar lønir fyri parlamentariskt arbeiði 20 t.kr. hægri samanborið við játtanina fyri 2009. Sammett við 2008 er talan um eina hækking í útgoldnum lønum uppá 195 t.kr. Samlaði stuðulin til parlamentariskt arbeiði er farin úr 1.528 t.kr. í 2008 uppá 1.641 t.kr. í 2009. Ein hækking uppá 113 t.kr.

**Fyrisiting løgtingsins (Løgtingsskrivstovan)**
Niðanfyri er høvuðskontan løgtingsskrivstovan nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2008 og í mun til ætlan fyri 2009 (t.kr.):

| | 2009 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2008 | Munur 2008-09 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 5.413 | 5.560 | -147 | 5.207 | 207 |
| Keyp av vørum og tænastum | 2.839 | 3.291 | -452 | 3.022 | -184 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 627 | 500 | 127 | 184 | 443 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 202 | 0 | 202 | 52 | 150 |
| Ymiskur rakstrarkostnaður | 19 | 0 | 19 | 17 | 2 |
| Søla av vørum og tænastum | -164 | -20 | -144 | -99 | -65 |
| Skattur og avgjøld | 0 | 0 | 0 | 1 | -1 |
| | **8.935** | **9.331** | **-396** | **8.384** | **552** |

Útgreiningin vísir, at kostnaðir eru 396 t.kr. minni enn játtað. Største minninýtslan er við keypi av útbúnaði, sum er 452 t.kr. minni enn játtað, samstundis sum minninýtslan av lønum v.m. eru 147 t.kr. minni enn játtað. Keyp av útbúnaði, netto eru 443 t.kr. hægri enn í 2008. Keyp av vørum og tænastum eru 452 t.kr. lægri enn

játtað. Samanborið við 2008 er samlaði kostnaðurin til fyrisiting løgtingsins í 2009 hækkaður við 551 t.kr.

Í skjali A eru omanfyri standandi kostnaðir nærri útgreinaðir.

**Landsgrannskoðanin**
Niðanfyri er høvuðskontan landsgrannskoðanin nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2008 og í mun til ætlan fyri 2009 (t.kr.):

| | 2009 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2008 | Munur 2008-09 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 3.830 | 4.250 | -420 | 3.210 | 620 |
| Keyp av vørum og tænastum | 702 | 925 | -223 | 841 | -139 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 49 | 170 | -121 | 361 | -313 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 339 | 341 | -2 | 337 | 2 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 1 | 2 | -1 | 2 | -1 |
| Innanh. flytingar | 170 | 190 | -20 | 165 | 5 |
| Løgtingsgrannskoðararnir | 57 | 100 | -43 | 48 | 8 |
| | **5.147** | **5.978** | **-831** | **4.965** | **182** |

Sambært útgreiningini viðv. landsgrannskoðanini er talan um hækkingar á lønarøkinum uppá 620 t.kr., í mun til 2008. Í mun til lønarkarmin er talan um eina minninýtslu uppá 420 t.kr. á lønarøkinum. Kostnaðurin til keyp av vørum og tænastum er lækkaður við 139 t.kr., í mun til 2008 – og frávikið í mun til ætlan er ein minninýtsla uppá 223 t.kr. Sammett við játtanina í 2009 hevur stovnurin samanlagt eina minninýtslu uppá 831 t.kr. Í mun til 2008 er samlaði kostnaðurin til landsgrannskoðanina í 2009 hækkaður við 182 t.kr.

Í skjali B eru omanfyri standandi kostnaðir nærri útgreinaðir.

**Løgtingsins umboðsmaður**
Niðanfyri er høvuðskontan Løgtingsins umboðsmaður nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2008 og í mun til ætlan fyri 2009 (t.kr.):

| | 2009 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2008 | Munur 2008-09 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 2.278 | 2.380 | -102 | 2.146 | 132 |
| Keyp av vørum og tænastum | 533 | 570 | -37 | 611 | -78 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 151 | 50 | 101 | 42 | 109 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 160 | 180 | -20 | 161 | -1 |
| | **3.122** | **3.180** | **-58** | **2.960** | **162** |

Samanborið við ætlanina fyri 2009 er talan um eina samlaða minninýtslu uppá 58 t.kr. Størsta minninýtslan er innan lønir v.m. - minninýtslan er uppá 102 t.kr. Samanborið við 2008 eru kostnaðirnir hækkaðir við 162 t.kr.

Í skjali C eru omanfyri standandi kostnaðir nærri útgreinaðir.

**Grannskoðaraváttan**
Vit skulu vátta, at vit lúka lógarinnar habilitetstreytir, og at vit undir grannskoðanini hava fingið allar tær upplýsingar, vit hava biðið um.

Tórshavn, tann 5. januar 2011

**Sp/f Grannskoðaravirkið *INPACT***
løggilt grannskoðaravirki

Jógvan Amonson
statsaut. revisor

**Undirritaðu vátta hervið at hava lisið grannskoðanarfrágreiðingina, tann ___ / ___ - 2011.**

| | | | |
|---|---|---|---|
| ________________ | ________________ | ________________ | ________________ |
| Hergeir Nielsen | Jógvan á Lakjuni | Alfred Olsen | John Johannesen |
| formaður | 1. næstform. | 2. næstform. | 3. næstform. |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI

| Løgtingsmenn | t.kr. 2009 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2008 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 14.063 | | 14.107 |
| Tímalønt | 8 | | 0 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 240 | | 285 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 482 | | 363 |
| **Lønir v.m.** | **14.793** | **15.241** | **14.754** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 3 | | 3 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 636 | | 705 |
| Ferðing og flutningur, onnur | 0 | | 1 |
| Umboðan | 270 | | 197 |
| Telefon | 0 | | 5 |
| Grannskoðanar-, roknskapar- og løgfrøðiligar tænastur | 58 | | 0 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 33 | | 24 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **1.001** | **1.045** | **935** |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 0 | | 50 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **0** | **0** | **50** |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **0** | **0** | **0** |
| **Avskrivingar o.a.** | **0** | **0** | **0** |
| Útreiðslugreiddar veitingar | 2.120 | | 2.085 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **2.120** | **2.100** | **2.085** |
| Altjóða felagsskapir | 246 | | 250 |
| **Tilskot til útlandið** | **246** | **250** | **250** |
| **Søla av vørum og tænastum** | **0** | **0** | **0** |
| **Skattur og avgjøld** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyps- mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **Løgtingsmenn tilsamans** | **18.159** | **18.636** | **18.074** |

| Stuðul til parlamentariska arbeiðið | t.kr. 2009 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2008 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 1.241 | | 1.106 |
| Tænastumenn | 151 | | 11 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 0 | | 94 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 47 | | 41 |
| Eftirlønir | 105 | | 97 |
| **Lønir v.m.** | **1.544** | **1.524** | **1.350** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 20 | | 6 |
| Umboðan | 0 | | 1 |
| Keyp av vørum annars | 39 | | -54 |
| Telefon | 77 | | 93 |
| Postgjøld | 0 | | 1 |
| Grannskoðanar-, roknskapa- og løgfrøðiligar tænastur | 4 | | 0 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv og kunningartøkni | 3 | | 4 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | -80 | | 41 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **63** | **200** | **91** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 29 | | 38 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 4 | | 50 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **34** | **0** | **88** |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **0** | **0** | **0** |
| **Søla av vørum og tænastum** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Stuðul til parlamentariska arbeiðið - tilsamans** | **1.641** | **1.724** | **1.528** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI - framhald

| Eftirlitsuppgávur | t.kr. 2009 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2008 |
|---|---|---|---|
| **Lønir v.m.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **0** | **150** | **0** |
| **Søla av vørum og tænastum** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Eftirlitsuppgávur - tilsamans** | **0** | **150** | **0** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI - framhald

| Fyrisiting løgtingsins | t.kr. 2009 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2008 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 3.893 | | 3.649 |
| Tænastumenn | 684 | | 670 |
| Tímalønt | 234 | | 254 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 26 | | 10 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 164 | | 155 |
| Eftirlønir | 520 | | 468 |
| Endurgjald í sambandi við lønir | -107 | | 0 |
| **Lønir v.m.** | **5.413** | **5.560** | **5.207** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 1 | | 17 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 3 | | 11 |
| Umboðan | 17 | | 37 |
| Orkukeyp - el | 222 | | 211 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 172 | | 252 |
| Orkukeyp, maskinur, flutningsútbúnaður o.a., olja, oljuúrdrát | 181 | | 117 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 14 | | 23 |
| Keyp av vørum annars | 113 | | 197 |
| Telefon | 48 | | 51 |
| Postgjøld | 8 | | 9 |
| Grannskoðar-, roknskapa- og løgfrøðiligar tænastur | 116 | | 89 |
| Trygging | 42 | | 52 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv- og kunningartøkni | 1.160 | | 1.386 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 741 | | 571 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **2.839** | **3.291** | **3.022** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI - framhald

| Fyrisiting løgtingsins | t.kr. 2009 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2008 |
|---|---|---|---|
| Telduútbúnaður og edv-menning | 533 | | 130 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 94 | | 54 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **627** | **500** | **184** |
| Húsaleiga | 1 | | 0 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar | 201 | | 52 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **202** | **0** | **52** |
| **Avskrivingar o.a.** | **0** | **0** | **0** |
| Kostnaðargreiddar veitingar | 19 | | 17 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **19** | **0** | **17** |
| Vørusøla til privat | -164 | | -97 |
| Vørusøla til almennar stovnar, virksemi og verkætlanir | 0 | | -2 |
| **Søla av vørum og tænastum** | **-164** | **-20** | **-99** |
| Morarentur | 0 | | 1 |
| **Skattur og avgjøld** | **0** | **0** | **1** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyps- mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **Fyrisiting løgtingsins tilsamans** | **8.935** | **9.331** | **8.384** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **LØGTINGSARBEIÐI TILSAMANS** | **28.736** | **29.841** | **27.986** |

## SKJAL B: LANDSGRANNSKOÐANIN

| Vanligt virksemi | t.kr. 2009 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2008 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 2.084 | | 1.691 |
| Tænastumenn | 1.137 | | 1.113 |
| Tímalønt | 183 | | 80 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 116 | | 98 |
| Eftirlønir | 310 | | 228 |
| **Lønir v.m.** | **3.830** | **4.250** | **3.210** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 28 | | 1 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 103 | | 137 |
| Umboðan | 66 | | 75 |
| Orkukeyp - el | 11 | | 16 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 24 | | 35 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 8 | | 3 |
| Keyp av vørum annars | 69 | | 80 |
| Telefon | 20 | | 14 |
| Postgjøld | 5 | | 4 |
| Trygging | 2 | | 5 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv- og kunningartøkni | 171 | | 233 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 194 | | 238 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **702** | **925** | **841** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 8 | | 349 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 41 | | 13 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **49** | **170** | **361** |
| Húsaleiga | 328 | | 322 |
| Langtíðarleiga og leiga annars | 4 | | 4 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldskostnaður, bygningar | 7 | | 1 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur av maskinum v.m. | 0 | | 10 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **339** | **341** | **337** |
| Kostnaðargreiddar veitingar | 1 | | 2 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **1** | **2** | **2** |
| **Rentukostnaður o.a.** | **0** | **0** | **0** |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr. | 170 | | 165 |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **170** | **190** | **165** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - innt.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyps- mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **Vanligt virksemi tilsamans** | **5.090** | **5.878** | **4.916** |

## SKJAL B: LANDSGRANNSKOÐANIN - framhald

| Løgtingsgrannskoðararnir | t.kr. 2009 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2008 |
|---|---|---|---|
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 54 | | 47 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 2 | | 2 |
| | **56** | **100** | **48** |
| Keyp av vørum annars | 1 | | 0 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **1** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr.** | **0** | **0** | **0** |
| **Løgtingsgrannskoðararnir tilsamans** | **57** | **100** | **48** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **LANDSGRANNSKOÐANIN TILSAMANS** | **5.147** | **5.978** | **4.965** |

## SKJAL C: LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

| Vanligt virksemi | t.kr. 2009 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2008 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 1.240 | | 1.206 |
| Tænastumenn | 684 | | 666 |
| Tímalønt | 40 | | 36 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 70 | | 0 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 66 | | 65 |
| Eftirlønir | 179 | | 173 |
| **Lønir v.m.** | **2.278** | **2.380** | **2.146** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 9 | | 40 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 84 | | 87 |
| Umboðan | 11 | | 3 |
| Orkukeyp - el | 6 | | 8 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 12 | | 17 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 7 | | 4 |
| Keyp av vørum annars | 58 | | 51 |
| Telefon | 23 | | 26 |
| Postgjøld | 7 | | 9 |
| Trygging | 1 | | 2 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv og kunningartøkni | 141 | | 110 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 175 | | 254 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **533** | **570** | **611** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 51 | | 42 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 100 | | 0 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **151** | **50** | **42** |
| Húsaleiga | 164 | | 161 |
| Vanligar flytingarinntøkur | -4 | | 0 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur o.a.** | **160** | **180** | **161** |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR TILSAMANS** | **3.122** | **3.180** | **2.960** |

## SKJAL D: EFTIRLØN OG BÍÐILØN TIL LØGTINGSMENN

| Kostnaður | t.kr. 2009 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2008 |
|---|---|---|---|
| **Lønir v.m.** | **0** | **0** | **0** |
| Tænastumannaeftirlønir | 4.546 | | 5.369 |
| **Tilskot til einstaklingar** | **4.546** | **4.544** | **5.369** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **EFTIRLØN OG BIÐILØN TIL LØGTINGSMENN TILSAMANS** | **4.546** | **4.544** | **5.369** |

## SKJAL E: NÝGGJUR BYGNINGUR TIL FØROYA LØGTINGS

| Kostnaður | t.kr. 2009 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2008 |
|---|---|---|---|
| **Lønir v.m.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **0** | **0** | **0** |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur | 0 | | 85 |
| **Leiga. Viðlíkahald og skattur** | **0** | **0** | **85** |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **0** | **0** | **0** |
| Bygningar, privat | 258 | | 800 |
| **Bygging og løguframleiðsla** | **258** | **250** | **800** |
| **Skattur og avgjøld** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **NYGGJUR BYGNINGUR TIL FØROYA LØGTINGS** | **258** | **250** | **885** |